Longri er millum marknaðarpris og brukarapris enn fólk vanliga halda. Vøran skal gjognum fleiri lið og hvørt liðið skal hava brottovinning. Tá so avgjøldini koma omanæ er upprunaprisurin bert ein lítil partur.
Mynd: Kalmar Lindenskov

Oljuprísurin rapar niður – men ikki í Føroyum

Síðan fyrst í november er prisurin á gassolju til føroyska húsarhaldið fallin við 129 krónum fyri hvørjar 1000 litrar. Hetta svarar til eitt prisfall upp á góð fyra prosent. Men sama tíðarskeið er prisurin á alheims marknaðinum fallin við heili 18 prosentum. Hetta fær mong at halda at oljuinnflytarirnir nú taka sær størri vinning enn áður og harvið gera sær dælt av støðuni.

ELI GUTTESEN

Raoljuprisurin á alheims marknaðinum heldur fram við at fella. Eftir trimum mánaðum er prisurin fallin úr 136 krónum fyri tunnuna heilt niður í 100 krónur fyri tunnuna. Hetta er eitt fall upp á yvir 25 prosent.

Fleiri samanfallandi orsøkir eru til stóra prisfallið á raolju seinastu tíðina. Veðrið hevur verið ovanliga lytt til árstíðina í einum stórum parti av Europa og hetta havt við sær at nýtslan er minni enn mett frammanundan. Haraftur at hevur buskaparkreppan í Asia ført til stórt fall í sølumetingunum.

Samstundis sum nýtslan er minkað, er utboðið á marknaðinum vaksið. Írak er aftur farið at utflyta olju og OPEC londini hava økt sína framleiðslukvotu.

Stóra prisfallið seinastu tíðina avmyndar ein avvisan nervøsitet á marknaðinum. Stór ovissa er millum framleiðslu og nýtslu, tí eingin veit við vissu, hvar prisurin fer at liggja tá avtornar.

Allir faktoramir, sum virka inn á prisin, kunnu broytast rættiligá skjótt og tí verður fylgt væl við hvat hendir á marknaðinum.

Gassoljan

Prisbroytingarnar í raoljuprisinum eru ikki alidnar fult igjognum í prisunum á ymisku oljuurðrattunum. Vanliga er ein seinking upp á útvið triggar mánaðir til ein prisbroyting í raoljuni slær fult igjognum í skrásettu prisunum á gassolju.

Meðan raoljan er fallin úr 19,5 US dollarum fyrst í november niður í 14,3 US dollarir nú um dagarnar, so er gassoljan fallin úr 185 US dollarir niður í 155 US dollarir sama tíðarskeið. Hetta merkir at raoljan er fallin um 5 US dollarir meðan gassoljan er fallin 30 US dollarir. Men lutfallsliga er raoljuprisurin fallin við 25 prosentum, meðan gassoljuprisurin bert er fallin við 18 prosentum sama tíðarskeið.

Føroyski prísurin

Brukaraprísurin til húsarhaldið er í løtuni 2.926 kronur fyri 1000 litrar av olju. Men av hesum prisinum er 403 kronur meirvirðisgjøld og 913 kronur eru oljuavgjald. Prisurin uttan avgjøld er í løtuni 1.610 krónur fyri hvørjar 1000 litrar av gassolju.

Fyrst í november var føroyski prisurin á gassolju uttan avgjøld 1,75 kronur fyri liturin. Í dag er prisurin 1,61 kronur fyri liturin. Hetta merkir at prisurin uttan avgjøld er fallin við 14 oyrum eftir trimum mánaðum. Hetta svarar til eitt prisfall upp á 8 prosent.

Orsøkin til at prisbroytingin á gassolju ikki slær fult igjognum í útsølupriinum uttan avgjøld er, at innkeypsprisurin hjá oljuinnflytarunum er um 60 prosent av útsølupriinum uttan avgjøld. Ein prisbroyting ávirkar sostatt bert henda partin av samlaða prisinum.

Við nuverandi prisum á altjóða marknaðinum skuldi verið pláss fyri eini 5 oyra lækking aftursat, men hetta er sjálvsagt treytað av, at nuverandi prisgongd heldur fram. Roknast kann tí við, at føroysku prisirnir á gassolju fara at fella uppaftur meira í næstum.

Kirkjubømúrurin ikki burturgloymdur í tøgn

— Málið um at varðveita Múrin í Kirkjubø er nú tikið uppaftur, og miðað verður ímóti at hava eina niðurstøðu klára helst áðrenn februar mánaður er úti, sigur Ivan Johannesen, landsstýrismaður við mántamálum

PÓL A KLETTI

Farna ár var mikið kjak um hvussu Múrurin í Kirkjubø best verður varðveittur. Fornfrøðingarnir á Fornminnissavninum hava sitt tilmæli, meðan ein áhugabólkur við umboðum úr Kirkjubøar Velbastaðar søkn og arkitektum hevur eina meira ítøkiligá verkætlan, sum miðar ímóti innilokan og at Múrurin verður brúktur eitt nú sum savn til kirkjubøstólarnar, sum nú eru í varðveitslu á Tjóðminnissavninum í Keypmannahavn.

Partarnir hava verið ójavnir á máli, um hvussu Múrurin skal varðveitast, men í seinastuni tykjast aldurnar at hava lagt seg og sjógvurin kyrraður aftur. Ein orsøkin kann vera landsstýrismannaskifti.

Tá Sámal Petur í Grund fór úr landsstýrinum, vórðu malsøkini býtt av nýggjum. Ivan Johannesen, landsstýrismaður, umsitur nú mentamál, og harvið eisini Múrin í Kirkjubø.

Hann sigur, at fyri tí um einki frættist beint nu um málið, so er Múrurin ikki burturgloymdur í tøgn. Hetta er eitt týdningarmikið mál, ið ein ikki kann dála við at taka støðu til. Tí tað tolir Múrurin ikki.

– Vit hava fyri fáum døgum síðan havt fund við áhugabólkin – kirkjubøfólk og arkitektar – um málið. Hetta var ein kunnandi fundur. Tað, sum vit miða ímóti, er at taka eina avgerð um hvat í gerast skal við Múrin, og ta avgerðina ætli eg, vit skulu taka skjótt, sigur Ivan Johannesen.

Ivan Johannesen sigur, at hann saman við mentamálastjóranum, Joannes Dalsgaard, nú kannar alt málið – øll uppsøkt og øll sjónarmið – við tí í hyggju at hava eina niðursøðu klára helst áðrenn februar mánaður er úti.



Múrurin í Kirkjubø. Spurningurin um varðveitingartiltøk er nú tikin uppaftur. Landsstýrismaðurin við mentamálum miðar ímóti eini skjótari avgerð
Mynd: Kalmar

»Ísblomstrið« til Sumbiar

Væl umtókti norski drama-leikurin hjá Terje Nordby er farin út at ferðast. Tvær sýningar verða í bygdarhúsinum í Sumba í dag.

BEATE L. SAMUELSEN

Seinasta vikuskiftið vitjaði Havnar Sjónleikarfelag Atlantis- í Klaksvík við leikinum -Ísblomstrið-, ið Terje Nordby hevur skrivað. Í dag fer Sjónleikarfelagið at hava tvær sýningar av leikinum í Suðuroynni. Tær verða báðar í bygdarhúsinum í Sumba.

Finnbjørg Nattestad frá Havnar Sjónleikarfelag sigur, at tað ikki bara er sum at siga tað at fara út at ferðast við einum sjónleiki. Allur pallurin skal pakkast niður. Tí arbeiðinum ayrgja leikararnir sjálvir fyri. Haraftrat seta teir pallin upp aftur í hvørjum stað. Øll ljósútgerðin skal við, tí umstøðurnar eru ikki tær somu úti á bygd sum í Havn. Sostatt má ljósmaðurin við á allar turarnar, so hann kann seta ljósini upp.

Folk á staðnum eru tibetur altið fúsir at hjálpa, tá Havnar Sjónleikarfelag vitjar, upplýsir Finnbjørg.

Tillagaðar rørslur

Ikki er altið eins lætt at venja seg við aðrar pallumstøður. Við hvørt er neyðugt at leika á einum minni palli. Umstøðurnar aftanfyri leikpallin eru eisini ymiskar á hvørjum stað. Tí er neyðugt at taka eina gjognumgongd av leikinum, so rørslurnar verða tillagaðar pallinum.

Hóast mikið stríð og strev er tað altið eitt upplivilsi at ferðast við einum leiki, og vonar Havnar Sjónleikarfelag, at nógvir suðuroyingar fara at hyggja eftir leikinum, sum Eyð Matras hevur týtt og leikstjornað.

Tey leikandi eru Hilmar Joensen og Karlot H. Jacobsen úr Nólsoy og Jytte Joensen úr Havn.

Tvær sýningar verða í Sumba í dag, onnur kl. 4 seinnapartin og hin kl. 7 í kveld.

Avmarkað atgongd. Til ber at keypa atgongumerki undan hvørjari sýning.

Tey bæði Jytte Joensen og Hilmar Joensen í leikinum "Ísblomstrið", ið framført verður í bygdarhúsinum í Sumba í dag.
Mynd: Kalmar Lindenskov